Búskapur og vinna:

## Færri klædnahandlar

Ein nýggj kanning vísir, at talið á klædnahandlum í Danmark fer at minka nógv tey næstu árini. Í dag eru umleið 2.500 klædnahandlar í Danmark, men sambært kanningini verða teir bara einir 450 í tali um átta ár.

Orsøkin er ikki, at danir keypa minni klæðir, men heldur, at fólk fara at keypa klæðini í stórhandlum sum Bilka, Føtex, Kvickly og Obs.

Stórhandlarnir hava tey seinnu árini tikið ein altsamt størri part av klædnamarknaðinum, og hetta er tann sama gongdin sum í flestu øðrum evropisku londunum. Royndirnar aðrastaðni vísa, at nakrir fáir av teimum stóru klædnahandlunum standa seg í kappingini, men at teir flestu smáu noyðast at lata aftur.

## Fellur enn

Virðið á argentinska gjaldoyranum peso fellur framvegis, og mánadagin var tað komið niður á fýra peso fyri ein amerikanskan dollara.

So lítið virði hevur argentinska gjaldoyrað ikki havt í mong ár, og síðani krepputiltøkini í januar er virðið fallið 75 prosent. Búskaparfrøðingar bera ótta fyri, at tað stóra fallið kann elva til stóra inflasjón eins og í kreppuni fyrst í nítiárunum.

## Stórur bókahandil

Tey bæði donsku feløgini CEC Gads Boglader og B. O. Bøger A/S hava sett sær fyri at leggja saman. Tey bæði feløgini hava í dag ávikavist 18 og 12 bókahandlar ymsastaðni í Danmark, og ætlanin er, at allir 30 handlarnir skulu halda fram í nýggja felagnum. Hildið verður, at umsetningurin hjá nýggja felagnum verður um 475 mió. krónur. Í fjør høvdu bæði feløgini hall.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Tað finnast ikki sivilfólk í Ísrael



*Limir í Al-Aqsa í gøtunum í Gaza-býi seinasta vikuskiftið*
*Mynd: Reuters*

**Tann víðgongdi palestinski bólkurin Al-Aqsa boðar frá fleiri sjálvmorðsatsóknum í Ísrael**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Al-Aqsa er ein felagsskapur, sum hevur sín uppruna í Fatah-rørsluni hjá Yasser Arafat. Felagsskapurin hevur seinastu tíðina skipað fyri fleiri atsóknum at málum í Ísrael og ísraelskum hermonnum, og tað fekk í februar amerikanska verjumálaráðið at seta felagsskapin á listan yvir altjóða yvirgangsfelagsskapir.

Hann er tann fyrsti palestinski felagsskapurin, sum er komin á hendan listan, síðani palestinski uppreisturin byrjaði fyri hálvum øðrum ári síðani.

Amerikanska avgerðin hevur ikki havt stórvegis ávirkan á leiðsluna í Al-Aqsa, sum tvørturímóti hevur boðað frá, at hon tekur tað sum ein heiður, at felagsskapurin er komin á svartalista hjá USA.

Yasser Arafat og teir palestinsku sjálvsstýrismyndugleikarnir hava ferð eftir ferð kravt, at Al-Aqsa skal gevast við sínum atsóknum at sivilum ísraelsmonnum, men tí hevur leiðslan sýtt fyri.

- Tað finnast eingi sivilfólk í ísraelska samfelagnum, segði politiski leiðarin í Al-Aqsa, Naser Badawi, við New York Times í gjár.

### Kapping við Hamas

Al-Aqsa varð stovnaður á sumri í 2001, og stigtakararnir vóru menn, sum hildu, at Arafat var ov veikur. Tað vísti seg, at nógvir palestinar tóku undir við hesum sjónarmiði, og tí fekk felagsskapurin eftir stuttari tíð nógvar limir bæði á Vestara Áarbakka og í Gaza-geiranum.

Síðsta heyst boðaði felagsskapurin frá, at hann fór bert at søkja at ísraelskum hermonnum og jødiskum niðursetumonnum, men í januar broytti felagsskapurin kós, tá tað gjørdist greitt, at ein annar felagsskapur, Hamas, fekk størri og størri undirtøku eftir at hava skipað fyri sjálvmorðsatsóknum í Ísrael. Tí valdi Al-Aqsa at gera tað sama.

Al-Aqsa hevur skipað fyri fleiri sjálvmorðsatsóknum í Ísrael seinastu mánaðarnar. M.a. skipaði felagsskapurin fyri einari atsókn í Jerusalem, sum kostaði níggju ísraelsmonnum lívið tann 2. mars.

# USA og Vietnam stríðast um flóttafólk

**Amerikansku myndugleikarnir eru sinnaðir at geva umleið 1.000 vietnamesarum friðskjól, men Vietnam sigur nei.**

FLÓTTAFÓLK
*Árni Joensen*

Teir umleið 1.000 vietnamesararnir eru í Kambodja, eftir at tað eydnaðist teimum at flýggja hagar úr Vietnam. Amerikanska uttanríkisráðið hevur boðað frá, at vietnamesararnir eru væl komnir til USA, men fólkini sleppa ikki avstað, fyrr enn teir kambodisku myndugleikarnir geva teimum loyvi at fara.

Amerikanski sendiharrin í Pnom Penh, Kent Wiedemann, sigur, at hann hevur søkt kambodisku myndugleikarnar um útferðarloyvi til vietnamesararnar, men at hann hevur ikki fingið svar enn.

Tey umleið 1.000 flóttafólkini eru á einum fjarskotnum staði, men myndugleikarnir ætla at flyta tey til Phnom Penh, tí teir bera ótta fyri, at vietnamesisku myndugleikarnir fara at noyða tey at venda heimaftur.

Flóttafólkini eru úr einum fjallalendi í Vietnam, og tey valdu at flýggja, tá vietnamesiska stjórnin sendi herin niðan í fjøllini, eftir at fólkið har hevði kravt størri trúarfrælsi og rætt til jørð. Stjórnin í Vietnam hevur boðað kambodisku myndugleikunum frá, at hon vil hava flóttafólkini send heimaftur.

Úr Norðurlondum:

## Vænta ófrið

Norska løgreglumannafelagið ber ótta fyri ófriði í sambandi við ein fund, sum Heimsbankin ætlar at hava í Oslo í summar.

Felagið hjá løgreglumonnunum fer so langt sum at mæla til, at fundurin verður avlýstur, og felagið vil vera við, at tað fer at kosta norsku skattgjaldarunum óneyðuga nógvan pening at skipa fyri fundinum og teimum neyðugu trygdartiltøkunum. Harafturat væntar felagið ófrið, og at nógv fólk fara at fáa skaða í samanbrestum.

Í fjør skuldi Heimsbankin halda ráðstevnu í Barcelona, men fundurin varð avlýstur, tí myndugleikarnir væntaðu ó frið. Ráðstevnan í ár skuldi upprunaliga verða í Stockholm, men seinni varð avgjørt at flyta hana til Oslo. Norska stjórnin hevur játtað at skipa fyri fundinum.

## Nýggj sálmabók

Tíðliga í mai fær danski kirkjumálaráðharrin Tove Fergo eitt uppskot um nýggja sálmabók til donsku fólkakirkjuna. Arbeiðið við nýggju sálmabókini hevur tikið drúgva tíð og hevur elvt til togan aftur og fram, og biskuppurin í Keypmannahavn, Erik Norman Svendsen, sum er formaður í sálmabókanevndini, sigur, at nevndin hevur fingið nógvar viðmerkingar.

Í teirri sálmabókini, sum danska kirkjan nýtir í dag, eru 745 sálmar. Í teirri nýggju verða 775.

## Hald á konto

Norska felagið Norsk Hydro vil ikki finna seg í, at myndugleikarnir í Ukraina hava sýtt fyri at rinda felagnum meiri enn 100 mió. krónur, sum felagið eigur til góðar í Ukraina. Tí hevur fealgið sett sakførarar at leggja hald á ukrainsk virði uttanlands, og í síðstu viku legði felagið hald á eina konto í einum banka í París. Tað var ivaleyst onkra avleiðing, tí talan er um kontoina hjá ukrainsku sendistovuni í franska høvuðsstaðnum.



# Mótasíðan

## Fjøltáttað handilslív í gomlu bommfabrikkini

Húsini, sum flest øll havnafólk, kenna sum gomlu bommfabrikkina, eru nú vorðin til ein handilsbygning við ríkum og fjølbroyttum úrvali. Í hesum bygningi halda í løtuni Frú S, PAU og Drós til

HANDILSLÍV
Ingrid Bjarnastein

PAU er eitt føroyskt vørumerki, sum tær báðar Dania Danielsen og Anna Mortensen standa aftanfyri. Tær hava verið í hesi vinnuni í samfull trý ár, og hava tær hildið til í Dr. Jakobsensgøtu síðani desember mánaða í fjør.

– Tað tekur sera langa tíð at koma rættiliga í gongd, greiðir Dania frá.

– Vit hava verið í gongd í fleiri ár, men ikki fyrr enn fyri nøkrum fáum mánaðum síðani hava vit fingið hølir her í havnagøtum, og mugu vit sigast, at vera rættiliga hepnar.

PAU hevur nógvar vørubíleggingar. Millum annað verður seymað til útisetakórið Mpiri, hjá Sunnleivi Rasmussen í Keypmannahavn, og henda vegin hava tær eisini fingið nógvar aðrar bíleggingar.

– Men fyri nú, so hava vit lagt uttanlandshandilin á hillina, sigur Dania.

– Eftirspurningurin er so stórur í Føroyum, at vit hava valt at nøkta henda tørvin fyrst og fremst, men vit ætla uttan iva at taka virksemið í útlandinum uppaftur. Stílurin PAU leggur seg eftir er tað altjóða sniðið. Hildið verður ikki beinleiðis fast um tað gamla – tað at ein troyggja skal síggja út soleiðis ella soleiðis. Nýmótans føroysk klæðir, virkað úr føroyskari ull, sum sita væl á kroppinum. PAU hevur havt nógv úrval til kvinnur, ung og børn, og nú eru menninir eisini slopnir upp í part.

– Vit hava ikki havt nakað serligt til menninar, men nú hava vit fingið okkurt til teirra eisini, sigur Dania Danielsen.

## Ein øðrvísi gávubúð





termokannur: 159,- stk



glasamplir: 79,- stk

Frú S byrjaði í einum lítlum kjallara í Jónas Broncks gøtu. Kjallarin var ikki meira enn eini 18 m² til støddar. Tí helt Susan Stakksund, at tørvurin fyri plássi var ikki so stórur, men nú vísir tað seg, at Frú S verður noydd at víðka um gólvvíddina í handlinum. Frú S fyllir trý tann 28. apríl, og tað handilin leggur seg eftir er tann trendstílurin, sum er í dag. Litirnir eru ljósir og lættir, og gávulutirnir tú fært hjá Frú S, eru ikki sovorðnir tú sært allastaðni. Innbúgv, møblar, brúksting, barnaklæðir, meturvøra eru bara eitt lítið brot úr lutunum, ið verða seldir inni í gávubúðini í Dr. Jakobsens gøtu. Barnaklæðini, ið seld verða, eru av vælumtókta danska merkinum, Okker Gokker.

– Eg fari at fáa meira møblar, tí tað vísir seg at vera tað, sum fólk eru ógvuliga áhuga í, greiðir Susan Stakksund frá. – Handilin fær nýtt inn allatíðina, og tað ger, at hann hongur ikki í tí sama leingi.

Hugnaligu hølini í Dr. Jakobsens gøtu síggja ikki rættiliga út sum ein handil. Har eru fleiri 1000 ting inni, sum øll hava sín serstaka dám.

Frú S og PAU noyðast nú at víðka um virksemið. Susan hevur tørv á meira plássi, og tað hevur við sær, at PAU fær hølini við síðuna av, ístaðin fyri bakhølini hjá Frú S. Soleiðis fær PAU eisini sín egna sýnisglugga. Tær báðar, sum halda til í gomlu bommfabrikkini, lata serstakliga væl at. Sølan gongur væl, og tær eru fegnar um, at kunna vera við í einum nútímans og altjóða høpi.